tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 23.03.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss møttir fyri Súsannu Bertholdsen

Ikki møtt: Bjarni Hammer, fráboða og Súsanna Bertholdsen fráboða

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 18/23 | 23/00106-3 | Borgarafundur í SALT 26. mars 2023 -Livilig Kor |
| **Til kunningar** | | |
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin og boðar frá at forfall er komið frá Súsannu Bertholdsen og Bjarna Hammer.

Súsanna Bertholdsen hevur fráboða, at hon hevur forfall til eyka býráðsfundin og hevur samstundis sagt frá, at hon ynskir at vara limur møtir fyri seg.

Fyrsti vara limur á lista C, Javnarflokkurin er Eyð Eidesgaard; men við tað at Eyð metur seg verða ógegnia, at viðgerða hetta málið, sum er á skrá til býráðsfundin, ynskir Súsanna, at heitt verður á teg, ið er valdur næstur varalimur á listanum hjá Javnarflokkinum, um at møta á býráðsfundinum, sum er Jens Arni Leo Hammerfoss, ið hevur siti fyri í býráðnum

Kristin Michelsen lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru. Ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**18/23**
**23/00106-3 Borgarafundur í SALT 26. mars 2023 -Livilig Kor**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 23.03.2023 | 18/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 20.03.2023**
Umsitingin hevur hin 19.03.2023 móttikið skriv frá umboði úr bólki nevndur Livilig Kor, ið upplýsir, at skipa verður fyri borgarafundi í SALT 26.03.2023. Í skrivinum verður kunna um skrá til borgarafundin, sum upplýst verður, er løgd út á sosialir miðlar í gjárkvøldið.

Samb. innbjóðingini verður Tvøroyrar kommunu biðin um at luttaka við 2 umboðum til pallborðskjak. Hvat pallborði ítøkuliga skal kjakast um framgongur ikki, annað enn at:

1) *"Endamálið við borgarafundinum er at leggja broytingaruppskot fram og hava eitt opið orðaskifti millum allar relevantar aktørar um framtíðina hjá Tvøroyri"*
2) *"Livilig kor fara at umrøða møguleikan fyri einum trýpartadialogi millum kommunu land og vinnu í mun til býarplanlegging og staðseting av stóríðnaði"*
3) *Tey, sum taka lut, umframt Tvøroyrar Kommunu, eru: Borgarar, Varðin Pelagic, vónandi umboð fyri landsstýrið, ein samfelagsfrøðingur og tveir arkitektar.*

Umsitingin er ikki kunna um hvat broytingaruppskot og hvørjar framtíðarætlanir fyri Tvøroyri hugsanin er at kjakast um.

***Skráin fyri fundin samb. Livilig kor:***
1) *Limir úr "Liviligum korum" bjóða vælkomin og greiða frá endamálinum við fundinum.*
2) *Sámal Matras, samfelagsfrøðingur, tosar yvirskipað um samfelags- og býarplanlegging.*
3) *Nina Alberg Arge, arkitektur frá Landsverk, leggur fram um arkitekturpolitikkin hjá landinum.*
4) *Kári Thomsen, arkitektur, leggur fram broytingaruppskot vegna áhugabólkin "Livilig kor", sum er grundað á meginreglur innan burðardygga vinnu og burðardygga samfelags- og býarplanlegging.*
5) *Greitt verður frá mannagongdini við broytingaruppskoti ísv. viðgerð í landsstýrinum og kærumøguleikum.*
6) *Framløga av meiningakanning.*
7) *Panelborðskjak og spurningar frá borgarum.*

*"Livilig kor á Tvøroyri"*

## Lógargrundarlag:

Kommunustýrislógin kap. 3, Kommunustýrisfundir

**§ 13.** *Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.

Viðmerking til skipan av einari kommunu og kommunala sjálvræði

*Kommunala sjálvræðið er tryggjað í § 56 í Stýrisskipanarlógini. Sambært stýrisskipanini verður rætturin hjá kommununum at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins síðani ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø. Av forsøguni til ásetingina í grundlógini, sum § 56 í stýrisskipanarlógini hevur støði í, fylgir, at tað, sum verður lagt til kommunurnar, altíð skal verða stýrt í einum demokratiskum stýriformi, sum skal verða valdur eftir reglunum í kommunuvallógini og stýrdur eftir reglunum í kommunustýrislógini. Tey viðurskifti, sum sambært grundlógini og stýrisskipani verða løgd til kommunurnar at stýra, viðvíkja ikki bara teimum vanligu - upprunaligu - felags viðurskiftunum í kommununi, men fevna eisini um aðrar ítøkiligar uppgávur, sum sambært serligari lóggávu eru lagdar til kommunurnar at taka sær av. Í kommunala sjálvræðinum liggur sostatt ikki bara ein rættur til at stýra ávísum egnum viðurskiftum, men eisini ein skylda til at taka sær av ávísum øðrum uppgávum, sum av landinum verða latnar kommunum at umsita. Í tann mun, uppgávan er løgd út til kommunurnar, verða tað tí einstøku – av borgarunum valdu – kommunustýrini, sum innan karmarnar í lóggávuni koma at gera ítøkiligu tillagingarnar av lógarendamálunum og hava ábyrgdina av lokalu almennu uppgávunum. Sambært kommunustýrislógini er hesin myndugleikin alment kompetentur, tá um kommunalar uppgávur og ábyrgd ræður, og myndugleikin er ikki undirskipaður miðfyrisitingini. Tí krevst lógarheimild fyri at áleggja kommununum uppgávur ella at gera inntriv í kommunal viðurskifti.*

## Fíggjarligar avleiðingar:

**Tilmælið:** Støðutakan til umboðan av Tvøroyrar Kommunu til pallborðskjak á borgarafundi, ið bólkur nevndur Livilig Kor, skipar fyri í SALT 26.03.2023.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 23. marts 2023:**

Borgarstjórin kunnar um, at innbjóðing er komin frá bólkinum «Livilig Kor», at Kristin Michelsen borgarstjóri og Bjarni Hammer møta til pallborðskjak í SALT komandi sunnudag 26. mars 2023. Borgarstjórin boðar frá, at hann er burturstaddur komandi sunnudag, tá borgarfundur er settur á skrá og kann tí ikki møta. Eisini boðar borgarstjórin frá, at Bjarni Hammer hevur fráboðað borgarstjóranum, at hann eisini er burturstaddur komandi sunnudag og kann ikki møta.

**Til kunningar**

Fundurin lokin kl. 17:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

~~Bjarni Hammer~~

Kristina Roest

Jens Arni Leo Hammerfoss